Dagtilhaldið í Runavík
heldur til í hølunum hjá Nón, á Torvgøtu 2 í Saltangará.
Opið er mánadag til hósdag frá kl. 14-17. Høvi er at gera ymiskt handaligt arbeiði, spæla kort, boccia og borðspøl. Týsdag er fimleikur. Eisini verður telduundirvísing. Bløðini eru til taks, og ein góður drekkamuður. Øll eru vælkomin.

Vága Pensionistafelag
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formann-in: Sofíu Haraldsen, tlf. 332741 ella nevndarlimunum.

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun! Teknað teg sum náttarravn ella gang ein royndartúr. Ring tlf. 212498 Daisy, 274696 Barbara, 224048 Óluf.

Spælistovan
í Margarinufabrikkini. Opið er mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 9-11.30 fyri børnum/foreldrum uttan ansing.

Kvinnuhúsið
Skrivstovan er opin gerandisdagar frá kl. 10-17. Tlf. 317200 svarar alt samdøgrið. www.kvinnuhusid.fo

Vitjunarvinir
Um tú vilt verða vitjunarvinur hjá Reyða Krossi ring ella skriva: Reyði Krossur Føroya, Bryggjubakki 10, Postsmoga 1015, 110 Tórshavn. Tlf. 319630. Fyriskiparar í Tórshavn, Eyrith tlf. 313784 og 513784 og Marin 314333 og 284333. www.redcross.fo

Sands Bygdasavn
Norðara Koyta, er opið hvønn dag í summar kl. 14-16. Bólkar kunnu bíleggja sær aðrar tíðir við at venda sær til Sandoyar Kunningarstovu á tel. 361836 ella info@visitsandoy.fo Kostnaður kr. 30

Iktys
Endurnýtsluhandilin Iktys tekur fegin ímóti góðum summarklæðum - serliga hvítum - kjólum, buksum, niðurdeilum, blusum, hattu m og summarskóm. Klæðini skulu vera pen og rein. Allur okkara peningur fer til tey fátækastu í heiminum. Kom inn og finn tær okkurt.

Frítíðarfelagið Antares
Áhugafelag hvørs endamál er at skapa samanhald og røkja áhugamál hjá teimum føroyingum, sum starvast í altjóða farma- og frálandavinnu. Vitja heimasíðu okkara á www.antares.fo ella send ein teldupost til antares.njordur@gmail.com, fyri at fáa meira at vita um felagið.

Epileptikarafelag Føroya
c/o MBF-Húsið, Íslandsvegur 10c, Tórshavn
Teldupostadr. randfrid@olivant.fo
Tlf. 263078 Randfríð og 219793 Mari.

Giktafelag Føroya
MBF-húsið - Íslandsvegur 10c
100 Tórshavn. Tlf: 310237
Opið er týsdag og hósdag frá 13 til 16.

Merkisdagar

Gullbrúdleyp
Leygardagin 17. mars hava Jeanetta og Erling Mýrá, Vágur, gullbrúdleyp. Vælkomst verður frá kl. 10.00-15.00 í heiminum hjá systur Jeanettu, Elithu á Fossavegi 25, Vágur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Brúdleyp
Hósdagin 15. mars giftast Heðin Christiansen, Tórshavn, og Shauntelle Genevieve Casper úr Winnipeg Canada. Brúdleypsadressan er: 705 Benchlands Tr. í Canmore Alberta Canada.

Brúdleyp
Leygardagin 7. apríl giftast Connie Reinert og Finnur Hansen í Kaldbaks kirkju. Nátturði verður í starvsmannafelagshúsinum kl 19. Øll eru hjartaliga vælkomin. Vinarliga sigið frá á tlf.nr 261101 ella 210119 áðrenn 18. mars.

70 ára føðingardagur
Týsdagin 27. mars fyllir Henning Bøgesvang 70 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 24. mars í Gøtu kirkju millum kl. 13 og 18. Øll eru hjartaliga vælkomin. Tað hevði verið gott, um tit, sum ynskja at gleða Henning við att koma, kundu ringt á tlf. nr 445400 áðrenn 19. mars.

50 og 45 ára føðingardagar
Tann 11. og 14. apríl fylla systkini Sivar Lassen, Ålesund, og Elisabeth Nybo, Viðareiði, (ættað úr Vági), 45 og 50 ár. Dagarnir verða hildnir saman páskaaftan tann 7 apríl kl 18.00 í Skálanum Bøgøta 11 Klaksvík. Tey, ið vilja halda dagin saman við okkum, eru vælkomin at boða okkum frá á Tlf 451093 og teldubústað jeny@olivant.fo áðrenn 31. mars kl 18.00.

Merkisdagar

Arbeiði

Søkt verður eftir
Tveimum røskum monnum at grava ein kjallara út. gmg@kallnet.fo
581585

Timburarbeiði
Timburarbeiði verður gjørt skjótt og væl. TFL 214148
214148

Bátar og bátaútgerð

DNG El snellur
2 stk DNG el snellur í fínasta standi, til sølu fyri kr. 12.500,- stk.
318828 - 585301

Bingo

Bingo
Gott bingo verður á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi týsdagin 13.03.12 kl 19.00. Øll eru vælkomin Veitslunevndin

Hey hey, nú verður tað aftur. 500 páskaregg
Páskareggja tombola við 500 páskareggum verður í Glæmuni í Kvívík sunnudagin 11 mars kl. 16. Øll eru hjartaliga vælkomin KFUM Skótarnir í Kvívík

Frá Eydnuni
Gott bingo verður í Eydnuni sunnudagin 11.Mars kl.16.00. 2 eykaspøl á 600 kr. Eydnan

Býli í Føroyum

Íbúð til leigu í Havn
Loftsíbúð 80 fermetrar, stór stova, 2 kømur, køkur, bað/wc og gongur. Prísur kr. 6.000 um mánaðin við el og hita.
211192

Lítil íbúð
ynskist til leigu á miðhædd ella kjallara, frá 1.apríl
Tlf 595179

Íbúð til leigu í Tórshavn
Undir Varða er ein rúmlig íbúð til leiga frá 15. mars, fyri 55oo kr um mánaðin + el. Íbúðin hevur stova, 2 kømur, køkur, baðirúm og gongd. Dep. krevst
214674

íbúð til leigu ella sølu
Ein íbúð í Vesturgøtu Tórshavn umleið 50 fermetrar til leigu frá 1.apríl fyri 4500,00kr.+olju og elektrisitet. Ring 311726
311726

Snotilig hús til leigu í Hoyvík
Nærum fult møblerað sethús verða leigað út í eitt ár fram. Fert tú væl um og roykir ikki, kunnu hesi húsini verða tíni fyri 9.500 krónur um mánaðin (+ el/fjarhita). Talan er um eini 11 ára gomul hús, 180 fermetrar í tveimum hæddum, við køki og stovu í einum, fýra kømrum, stórari loftsstovu og tveimum wc við brúsu. Húsini standa nær skúla, dagstovni, Bussleiðini og í barnavinarligum umhvørvi og góðum grannalagi. Húsini kunnu leigast beinanvegin.
Bill. mrk. 19.01.12

Friðalig kvinna søkir íbúð í Tórshavn
íbúð sóknast í Havn, Argjum ella í Hoyvík. Fari væl um, royki ikki og viðri útleigarans treytir. - max 4500 v. ljós og hita.
+298 276105

2 Kømur til leigu
við atgongd til køk, bað, vaskimaskinu, turkitrumlu, fristiboks og tráleyst internetbreiðband. Nær við Læraraskúlan og Sjómaskúlan
221158

Býli uttanlands

Ìbúð til leigu/evt. til sølu
Ìbúð 27 m2 eigaraìbúð í 8230 Åbyhøj,Aarhus til leigu, evt. til sølu, um áhugi er ring tlf. 313092

74-m2 NÝGGJ MØBLERA ÍBÚÐ TIL LEIGU Í KBH
Weidekampsgade 37-5,tv,IslandsBrygge. Myndir,http://www.facebook.Weidekampsgade 37 5tv . Útleigast dag-viku ella eftir avtalu. Nær við metro. 15. min. gongd til Tivoli-Ráðhúspl. 3. min. gongd til havnebadet-havneparken-kulturhuset. Atgongd til elevator, læst p-pláss, altan, internet-TV, vaskimaskina-turkitrumla.
hognivik@yahoo.dk 313339-279993

Dýr

Border Collie hundahvølpar
Tríggir ektaðir border collie hundahvølpar, verða latnir til djóravin. Tveir eru svartir og hvítir og ein er brúnur og hvítur.
583920 & 267373

Kettlingar
4 fittir kettlingar eru klárir at flyta heimanífrá. Um áhugi er, vinarliga ring.
210624

Fundir

Aðalfundur
Aðalfundurin hjá Sjóar Sóknar Arbeiðarafelag verður í Bygdahúsinum á Strondum mikudagin 14 mars 2012 kl. 19.00 Nevndin

Aðalfundur Felagið Vágar
Týsdagin 20. mars hevur Felagið Vágar aðalfund á Kunningarstovuni Leitisvegur 58 Miðvágur. Skrá samb. Lógini. Møti fjølment.
+298333455

Matur

Gott turt kjøt
Gott turt kjøt til sølu. Ring og bílegg á tlf. 230400
230400

nýslaktað svínakjøt fæst her
nýggj sending komin við frýskum svínakjøtið, pakkað og datomerkt á góðkendum sláturvirkið. vit leverað um alt landið. www.grisa-steik.com.
375259 221259 509102

Ymiskt

Prógv
16 januar hevur Katrin Vilhelm Poulsen, Tórshavn, lokið Master of Arts prógv í European Studies á King s College London.